# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Sirið Stenberg, løgtingsmaður

**Svarari:** Kaj Leo Holm Johannesen landsstýrismaður í heilsumálum

**Evni:** Átøk í Krabbameinsætlanini

**Spurningar:**

1. Nær er ætlanin at seta screening fyri tarmkrabba í verk?
2. Nær er ætlanin at víðka um bróstkrabbascreeningina?
3. Eru nøkur átøk í nýggju Krabbameinsætlanini sett í verk?

**Viðmerkingar:**
Krabbamein er álvarsom sjúka, sum á hvørjum ári rakar nógar føroyingar. Hóast viðgerðarmøguleikarnir eru batnaðir, og fleiri blíva frísk, ella liva við krabbasjúku, so doyggja nógv fólk árliga av krabbameini.

Í apríl í ár varð nýggj Krabbameinsætlan handað landssstýrismanninum. Í Krabbameinsætlanini eru 69 átøk, sum tilmælt er at seta í verk komandi tíðina. Í ætlanini er m.a. tilmælt at seta í verk screening fyri tarmkrabba, at broyta screeningina fyri lívmóðirhálskrabba og at víðka um bróstkrabbascreeningina.

Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at hann er sinnaður at seta átøk í verk beinanvegin. Tí er spurningurin, hvørji átøk verða sett í verk nú, og hvørji átøk møguliga eru sett í verk.

Í seinasta samgonguskeiði varð bróstkrabbascreeningin sett í verk, fyrsti onkologur varð settur í starv, og HPV koppseting bleiv sett í verk fyri dreingir. Umframt raðfestingar í kommunulæknaskipanini og serlæknum. Raðfesting av heilsuverkinum heldur fram, og spurningurin er tí, hvussu krabbameinsøkið er raðfest.

**Á Løgtingi, 4. august 2022**

Sirið Stenberg